

# VARPIÐ

Sosialurin

SvF • Mánadag 24. kl. 20.00

## »Hvít jól«

- Klassikari við Bing Crosby

Eftir 2. heimsbardaga gongur væl hjá vinmonnunum Phil og Bob, at undirhalda í náttklubba. Ein dagin síggja teir The Haynes Sisters, Betty og Judy, framføra. Bob verður forliptur í Betty og teir fylgja systrunum til næstu framførslu, sum skal vera á einum skíðítróttastaði í Maine. Men kavin og gestirnir hava svikið. Okkurt má gerast...





SvF • Fríggjadag 28. kl. 20.40

## Árið, ið fór í ítrótti

Bestu oyggjaleikirnir nakrantíð hjá Føroyum vóru í summar á Rhodos. NSÍ er føroyameistari hjá monnum í fótbólti, og fleiri úrmælingar hava gjørt vart við seg í svimjing og í kappróðri uttanlands. Enduruppliv hesar løtur, saman við nógvum øðrum góðum løtum í ítróttarárinum.



SvF • Leygardag 22. kl. 20.30

## »Einsamallur heima 4«

- Amr. familjufilmur við fø. Teksti

Jólini nærkast, og fyri at sleppa undan at verða happaður av teimum eldru systkjunum, fer 9 ára gamli Kevin til pápa sín og nýggju konu hansara at halda jól. Men jólafriðurin er úti, tá Kevin fær illgruna um, at skálkurin Marv og genta hansara ætla at bróta inn í milliónborgina hjá pápanum og teimum.

**Fríggjadagur 21. desember 2007**

**Filmir í hópatali • Barnasendingar • Dokumentar • Náttúra • Tíðindi alt samdøgrið**